LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

**30. desember 2024**

**Fylgiskjal 1**

## Umlættingarheimið Dáin

Umlættingarheimið Dáin heldur til á Mýrivegi 11 í Klaksvík.
Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur við egnum stýri, ið sambært viðtøkunum, sum komu í gildi tann 5. november 1987, telur tríggjar limir, ið sjálvir velja formann og næstformann. Sjálvsognarstovnurin Dáin eigur bygningin, ið stovnurin húsast í.

Sambært viðtøkunum er tað stýrið, ið setir og loysir úr starvi leiðaran fyri stovnin. Tó var ásett, at Almannaverkið góðkennir avgerðir hesum viðvíkjandi.

Talan er um ein stovn, ið veitir døgnumlætting til børn, ung og vaksin, ið hava menningartarn og bera sálarligt og/ella kropsligt brek. Stovnurin veitir eisini frítíðartilboð aftaná skúlatíð, ið er galdandi frá 3. flokki til 10. flokk.

Døgnumlættingin hevur rúm fyri fimm borgarum, umframt rúm fyri einum við bráðfeingistørvi.

Frítíðartilboðið hevði tá vitjað var fýra børn og ung. Leiðarin á stovninum upplýsti fyri umboðsmanninum, at tað var treytað av arbeiðsorkuni á stovninum, hvussu nógv børn og ung kundu vera í frítíðartilboðnum í senn.

Stovnurin hevur uml. 20-30 borgarar um árið.

Á stovninum starvast sjey starvsfólk, umframt leiðaran. Talan er um námsfrøðingar og heilsuhjálparar. Harafturat eru tríggir avloysarar í starvi.

## Samanumtøka og tilmæli

Samanumtikið var tað fatanin hjá umboðsmanninum, at talan var um ein stovn, ið hevði góðar karmar og starvsfólkahóp at taka sær av børnum. Umboðsmaðurin gav í hesum høpi gætur góðu skoðsmálini, sum tey avvarðandi góvu stovninum. Umboðsmaðurin helt tað vera gott at ætlanir vóru um, at dagføra og nútímansgera viðtøkurnar fyri stovnin. Umboðsmaðurin helt tað eisini vera gott, at leiðslan, aftaná eftirlitsvitjanina, hevði upplýst, at virkisætlanirnar vóru dagførdar fyri allar borgarar, ið knýttir vóru at teimum tilboðum, ið vóru á stovninum.

Grundað á samrøðuna við leiðsluna á stovninum, samrøðuna við tey avvarðandi, skjøl, ið umboðsmaðurin hevði fingið útvegað frá stovninum, og samskiftið við avvarðandi myndugleikar, hevði umboðsmaðurin soljóðandi viðmerkingar og tilmæli.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

**Viðtøkurnar**
Leiðslan á stovninum upplýsti fyri umboðsmanninum, at tað var eitt ynski frá leiðsluni, stýrinum fyri stovnin og Almannaverkinum, at viðtøkurnar, ið vóru frá 1987, fingu eina nútímansgerð og dagføring.

Almanna- og mentamálaráðið hevur aftaná eftirlitsvitjanina boða umboðsmanninum frá, at ætlanin er at fáa viðtøkurnar broyttar, soleiðis at tær samsvara við lóggávu og praksis á økinum í dag.

Umboðsmaðurin hevur í skrivi heitt á Almanna- og mentamálaráðið um at lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum um at dagføra viðtøkurnar fyri stovnin.

**Viðlíkahald av bygninginum**
Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at bygninginum tørvaði viðlíkahald, men vísti samstundis á, at tað var óvist hvør, ið hevði ábyrgdina av at halda bygningin við líka.

Almanna- og mentamálaráðið hevur aftaná eftirlitsvitjanina greitt umboðsmanninum frá, at spurningurin um hvør, ið hevði ábyrgd av viðlíkahaldinum av bygninginum, framvegis var ósvaraður. Í hesum sambandi hevði ráðið verið á fundi við Landsverk um málið.

Umboðsmaðurin hevur í skrivi heitt á Almanna- og mentamálaráðið um, sum skjótast, á fáa greiðu á, hvør hevði ábyrgdina av viðlíkahaldinum av bygninginum og at lata seg frætta, hvat ið víðari hendi í málinum.

**Húsreglur**
Leiðslan upplýsti fyri umboðsmanninum, at stovnurin ikki hevði niðurskrivaðar húsreglur.

Umboðsmaðurin mælti til, at stovnurin fekk niðurskrivaðar og atkomuligar húsreglur, soleiðis at tað var týðuligt fyri bæði borgarar, ið nýttu stovnin, og tey avvarðandi, hvat til eina og hvørja tíð var alment galdandi í sambandi við uppihald á stovninum.

**Samstarvið við Almannaverkið**
Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at stovnurin ynskti, at samstarvið við Almannaverkið kundi gerast betur.

Aftaná eftirlitsvitjanina greiddi Almannaverkið umboðsmanninum frá, at av tí at Dáin er ein sjálvsognarstovnur, fingu tey bert ta formligu kunningina, ið fór fram, og vóru ikki á sama hátt við í samskifti og kunning, sum tá man hoyrir til eina eind. Hóast hetta, so fingu starvsfólk hjá Dáanum atgongd til kunning, til ávíst fundarvirksemi, til leiðaradagar o.a. hjá Almannaverkinum, umframt at starvsfólk hjá Dáanum vórðu boðin til somu skeið og útbúgvingar, sum onnur starvsfólk hjá Almannaverkinum.

Vísandi til viðurskiftini kring samstarv, ið vórðu lýst fyri umboðsmanninum undir eftirlitsvitjanini og í eftirfylgjandi samskiftinum við Almannaverkið, mælti umboðsmaðurin stovninum til skjótast gjørligt at fáa í lag ein fund við Almannaverkið, soleiðis at stovnurin altíð var dagførdur ájavnt teimum stovnum, ið vóru innanfyri Almannaverkið, ið taka sær av meinlíkum uppgávum.

**Starvsfólkahópurin**
Í skjølunum, sum umboðsmaðurin fekk frá leiðsluni áðrenn eftirlitsvitjanina, var ein frágreiðing frá námsfrøðiliga eftirlitinum, ið hevði verið á stovninum í 2022. Í frágreiðingini stóð m.a., at *"...det faglige niveau på autismeområdet blandt medarbejderne er ved at blive styrket yderligere til gavn for indsatsen over for de visiterede borgere"*

Aftaná eftirlitsvitjanina spurdi umboðsmaðurin leiðsluna, hvussu førleikin innan autismuøkið var styrktur síðan eftirlitið skrivaði sína frágreiðing.

Leiðslan svaraði, at tá frágreiðingin hjá námsfrøðiliga eftirlitinum var skrivað, vóru tvey starvsfólk í starvi, ið høvdu eina útbúgving at taka sær av borgarum við autismu. Nú var eitt starvsfólk í starvi við hesari útbúgving. Leiðslan upplýsti tó, at tvey av starvsfólkunum høvdu nomið sær útbúgving í sernámsfrøðiliga arbeiðsháttinum "KRAP", og at tvey onnur starvsfólk vóru í gongd við tað sama.
Umboðsmaðurin mælti stovninum til at hava tað sum fremstu raðfesting, at starvsfólkini høvdu eina útbúgving, sum var hóskandi til ein málbólk, ið hevur autismu, sum sambært Almannaverkinum fór at vera málbólkurin, ið framyvir fór at verða visiteraður til stovnin.

**Tvingsil og harðskapur**
Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at leiðslan ikki metti seg hava neyðugu vitanina um tvingsilslógina (løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin).

Umboðsmaðurin mælti stovninum til at fáa sær ráðgeving og kunning frá Almannaverkinum um tvingsilslógina, soleiðis at stovnurin var ílatin at taka sær av støðum, ið kundu verða fevndar av tvingsilslógini.

**Bygningurin**
Undir eftirlitsvitjanini kundi umboðsmaðurin staðfesta aftaná prát við leiðsluna, at økið kring bygningin tørvaði viðlíkahald og var ikki skipað barnavinarligt.

Umboðsmaðurin heitti á stovnin um at kanna møguleikan at gera umstøðurnar uttanfyri meiri barnavinarligar, t.d. við reiggjum og líknandi.

**Hølisumstøðurnar**

Undir eftirlitsvitjanini legði umboðsmaðurin til merkis, at eitt týðuligt afturljóð merktist í kamarinum har eitt barn helt til.

Umboðsmaðurin heitti á stovnin um at kanna, um nakað skuldi gerast við ljóðviðurskiftini í hesum kamari.

**Verja av privatlívi og samanseting av borgarum – børn og vaksin**

Undir eftirlitsvitjanini spurdi umboðsmaðurin leiðsluna, hvussu stovnurin tryggjaði sær, at óviðkomandi ikki fóru inn til barnið, meðan barnið var einsamalt í kamarinum um dagin og um náttina, tá tað svav.

Til hetta svaraði leiðslan, at stovnurin hevði sovandi náttarvakt, og at náttarvaktin svav tætt við kamarið hjá barninum við opnari hurð. Leiðslan metti, at um onkur ætlaði sær inn í kamarið hjá barninum, so vaknaði náttarvaktin. Leiðslan legði afturat, at starvsfólkini kendu brúkarabólkin, ið var til døgnumlætting samstundis sum barnið, og mettu tey, at ongin vandi var á ferð, hvørki um dagin ella náttina, í mun til tað, ið umboðsmaðurin spurdi um.

Umboðsmaðurin heitti á stovnin um at tryggja sær, at tann fyriskipan, ið var kring barnið, til allar tíðir var trygg fyri barnið, bæði tá barnið búleikaðist í felagshølunum og var einsamalt í sínum kamari. Umboðsmaðurin hevði við hesum viðmerkingum í huga, at stovnurin bæði hýsti børnum og vaksnum.